# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Politiski ryggurin

Oddvitarnir í stóru samgonguflokkunum hevur tað ikki verið nógv at hoyrt til í vikuni undan ólavsøku. Løgmaður fyrireikar seg til ólavsøkuna, og ikki eitt kis hevur verið at hoyrt til tjóðveldisformannin. Formenninar í stóru andstøðuflokkunum hevur heldur einki verið at hoyra til. Í staðin hava tað verið teir í næstu røð, ið hava verið frammi. Næstformaðurin í Sambandinum var eirindarleysur í Atlantsflog málinum, og største atkvøðuslúkurin hjá Fólkaflokkinum hevur roynt at givið landsstýrismonnunum í vinnumálum og í fiski- og tilfeingismálum mótspæl. Teir báðir, ið hava verið mest frammi, eru landsstýrismaðurin í fiskimálum, ið eisini er næstformaður í Tjóðveldinum, og næstformaðurin í Sjálvstýrisflokkinum. Í stórum politiskum spurningum eru teir sera samdir. Eitt nú um vinnuligan fiskiskap, einskiljingar, í tunnilsmálinum og eisini  um undirvísing og gransking.

Tað hevur ikki verið gamalt, at andstøðuflokkar alment hava verið so nógv upp á talufót við samgonguna ella partar av henni, sum Sjálvstýrisflokkurin nú vísir seg at vera. Nýggi veruleikin ber víðari manøvreringsmøguleikar við sær fyri samgonguna. Um løgmaður er áhugaður í hesum, hevur enn einki verið at hoyrt um. Tað valdast ivaleyst eisini, hvørjar parlamentarisku avleiðingarnar av tunnilsmálinum fara at verða. Tað verður kanska greitt í morgin.

Um tað skal eydnast løgmanni og samgongu at fáa stóru málini í samgonguskjalinum loyst, so skulu tjóðarsemjur smíðast. Soleiðis orðaði løgmaður tað fyri einum hálvum ári síðani, og nú standa fleiri av málunum fyri framman, ið breiðar semjur skulu gerast um. Fyrsta málið er fiskarípolitikkurin. Fiskimálaráðharrin hevur latið skína ígjøgnum, at uppskotið um fiskidagar fer at liggja nærri tí, sum fiskifrøðingarnir ráða til, enn uppskotini hjá landsstýrismonnunum plaga at gera.

Eingin ábending hevur verið um, at fiskimálaráðharrin ella løgmaður hava tryggjað sær undirtøku fyri uppskotinum í samgonguflokkunum. Einasta parlamentariska útmeldingin er komin frá Sjálvstýrisflokkinum, ið hevur brúkt myndina, at útgangsstøðið skal takast í áseyðatalinum og ikki í, hvussu nógvum krovum pláss er fyri á ásinum. Hetta er í tráð við tað, ið fiskimálaráðharrin hevur sagt. Útgangsstøðið skal takast í stovnsrøktini og harvið í tilmælinum hjá fiskifrøðini. Fiskimálaráðharrin sigur seg vera sannførdan um, at tað er neyðugt at bremsa harðliga, tí gýtingarstovnurin er hóttur.

Landsstýrismaðurin spælir høgt spæl, og tað fer at krevja stórt politiskt hegni hjá honum og løgmanni at fáa sum frægast burturúr, og tað fer at krevja dirvi hjá einstøku samgongulimunum at bekenna sama kulør, sum Sjálvstýrisflokkurin longu hevur gjørt. Tíðin er komin, at tingið sigur, hvussu tað ætlar, at tað skal komast til sjálvberandi búskapin, ið øll politiska skipanina sigst vera samd um, at føroyska samfelagið treingir til. Tað krevur politiskan rygg!

**Sosialurin**

## Gerhard fær fullan stuðul

**Tíðindaskriv frá Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag**

Nevndin hevur havt fund um politisku støðuna. Nevndin hevur viðgjørt málið um Sandoyartunnilin og onnur mál sum eru aktuel.

Nevndin tekur fult undir við tí arbeiðinum og skrivinum sum løgtingsmaðurin Gerhard Lognberg hevur sent samgonguleiðarum, har hann krevur svar aftur mikudagin.

Tann óvissa sum er komin í Sandoyar sýslu er óbótalig.

Eisini vita vit at kommununar hava brúkt nógvan pening til at taka ímóti teimum avbjóðingum sum ein tunnil til suðurøkið gevur.

Við Javnaðarkvøðu

**Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag**

**William Davidsen, formaður**

## Sjálvgjørt er vælgjørt

**HEINI O. HEINESEN**



Síðani økisfriðingarnar og lógin "um vinnuligan fiskiskap" komu í gildi fyri 14 árum síðani, hevur tað gingist væl við fiskiskapinum á Føroyagrunninum. Tað vil siga, um vit ikki taka tey seinastu 4 árini við.

Gongdin seinastu 4 árini hevur gingið beint niðureftir við fiskiskapinum. Tað, sum vit serliga eiga at leggja til merkis, er tann stóra minkingin í toska- og hýsuveiðuni. Her átti tann reyða peran at lýst, serliga seinastu 2 árini.

Hetta er komið av einum alt ov høgum veiðutrýsti, serliga á toskin og hýsuna. Fiskiransóknarstovan sigur í sínum tilmæli, at tað er serliga húkaveiðan, sum er ov stór. Hetta kann umsitingin í fiskimálastýrinum takka sær sjálvum fyri, tí tað hevur verið sum at kóka kleynir at gjørt ein stóran part av útróðraflotanum um til línuskip. Ein stórur partur av hesum flota hevði bert loyvi at royna við snellu, ella fiska "háv", sum í dag er grundarlagið undir tí skjótt vaksandi línuskipaflota. Hetta ger, at inntøkan er fallin tilsvarandi, og av somu orsøk liggja fleiri línuskip, tí tey fáa ikki manning til eina minkandi inntøku.

Soleiðis sum Fiskivinnan - "lógini um vinnuligan fiskiskap" - er umsitin seinastu 12 árini, er ongin ivi í mínari verð, at vit eru í gongd við at saga greinina av, sum øll fiskivinnan hvílir á. Hetta havi eg so mangan víst á, bæði í skrift og talu.

Verandi lóg varð ein fyrimyndarlig skipan: Hetta er sjálvandi treytað av, at tað verður umsitið samsvarandi andanum í lógini. Eitt groft dømi er, at tú kanst selja endaliga burturav teimum døgum, sum tú hevur í kraft av fiskiloyvinum, uttan at loyvið verður inndrigið, sjálvt um tú hevur bert ein dag eftir. Tað vil siga, at vit hava ein ódeyðiligan flota. Kongstankin við lógini var frá fyrsta degi av, at vit framhaldandi komu at einum fjølbroytum flota, sum kundi tillaga seg sjálvur eftir búskarparligum fortreytum.

Um vit, sum gjørdu upprunalógina, høvdu fylgt uppskotinum hjá Petur Andersen so var eingin toskaog hýsustovnur til í dag, harvið varð allir húkaflotin eisini horvin. Við einum húkaflota, sum hevur eina hóskandi støðd, verður oljuforbrúki væl minni.

Um vit taka veiðutølini hjá Fiskidaganevndini fyri seinasta árið, so hevur ein partur av trolaraflotanum økt munandi um sín toskafiskiskap.

Veiðan av toski býtt í % millum skipabólkar seinasta fiskiár er:
<u>Bólkur 1:</u> Lemmatrolara yvir 400 HK. 18% lógin 4%
<u>Bólkur 2:</u> Trolara, pør yvir 400HK. 7% " 21%
<u>Bólkur 3:</u> Línuskip yvir 110 tons. 34% " 37%
<u>Bólkur 4 A og B:</u> Útróðrarbátar á línuveiðu 12% " 17%
<u>Bólkur 4 T:</u> Trolbátar størri enn 40 tons 6% saman við A og B
<u>Bólkur 5: A og B</u> Útróðrarbátar undir 15 tons 21% lógin 21%
<u>Bólkur 6:</u> Onnur 1% " 1%

Veiðutølini líkjast óhugnaliga nógv tí, sum fór fram fyrst hálvfemsunum.

Tað, sum nú hendir við veiðutølunum líkist nógv tí, sum fór fram fyrst í hálvfemsunum. Veiðan minkaði í eini 2 til 3 ár, til vit í 1993 ikki fiskaðu meira enn 6.000 til 7000 tons av toski og minni av hýsu við største og mest modernaða flota, sum nakrantíð hevur verið á føroyska landgrunninum. Tað sum eisini hendi tá, var at prosentparturin hjá trolinum vaks, meðan prosentparturin hjá húkaflotanum minkaði í sama mun, sum tann samlaða veiðan minkaði.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax  341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.